

sínar uppgávur, og arbeiðspláss verða skapt úti um landið. Arbeitt verður eisini við broytingum á skúlaøkinum, ið skulu tryggja, at meira fæst burturúr, og at skúlin verður betri.

***

Fyritreytin fyri fólkavøkstri er búskaparvøkstur.

Landsstýrið hevur saman við vinnuni gjørt eina vakstrarætlan , sum skal skapa størri virksemi og fleiri inntøkur til samfelagið. Farið er undir at endurskoða fiskivinnupolitikkin m.a. við atliti at brúksskyldu og umsetiligheit.

Okkara búskapur skal hava fleiri bein at standa á, og vit skulu fáa fleiri av okkara ungu heimaftur eftir lokna útbúgving. Við meira gransking, menning og nýskapan náa vit hesum málum. Tí arbeiðir landsstýrið við at seta í verk ein miðvísan granskingarpolitikk.

Vit koma ongan veg, um óttin fyri at fremja er størri enn viljin at betra og endurnýggja.

Skulu vit skapa nýggjar vinnur, mugu vit tora, og skulu vit røkka hægstu tindum, mugu vit taka tey smáu fetini fyrst. Eg skilji væl, at mong ivast í, um tað ber til at gróðurseta nýggjar vinnur, men vit mugu ikki gloyma, at okkara forfedrar hugdu við sama ivasemi at fyrstu føroysku sluppini, tá ið hon legði frá landi.

Okkara ítróttarfólk hava prógvað, at hægstu tindar kunnu røkkast, men teirra úrslit bera boð um, at vegurin upp á sigurspallin er langur og byrjar fleiri ár frammanundan á vøllum, í venjingarhølum og í hyljum.

Avrik teirra vísa, at er viljin til at eydnast størri enn óttin fyri at miseydnast, verða mál rokkin.

***

Framtíðin hjá Føroyum valdast, um vit megna at lofta teimum møguleikum og tora at taka ímóti teimum avbjóðingum gongdin í heiminum hevur við sær.

Handil og samstarv við onnur lond hava skapt framgongdina í okkara samfelagi. Vit útflyta so at siga alt, vit framleiða, og innflyta nærum alt, vit brúka.

Múrar køva framburð, og byrgja vit okkum inni her í Norðuratlantshavi, kemur stígur í. Umráðandi er tí, at Føroyar eru virkin partur av heimssamfelagnum, tí alheimsgerðin er ikki eitt val, men ein veruleiki. Vit mugu gerast ein meira samanrunnin partur av ES, og soleiðis geva okkara vinnulívi møguleika at virka uttan forðingar í Evropa.

***

Fá menniskju í heiminum hava so góð kor, sum vit føroyingar. Tað eiga vit at vera takksom fyri.

Ongantíð í søguni hava so mong menniskju í heiminum livað á hungursmarkinum, og hvønn dag doyggja áleið 17.000 børn í hungri. Vit eiga framhaldandi at vera partur av stríðnum ímóti fátækradømi. Okkara ábyrgd, sum samfelag og einstaklingar, er at vísa næstakærleika og stuðla teimum, sum líða neyð.

***

Veðurlagsbroytingar hava við sær, at jørðin gerst heitari, og fleiri strandalond og oyggjasamfeløg eru hótt, tí sjógvurin fløðir. Í desember savnaðust heimsins leiðarar tí í Keypmannahavn fyri at gera eina altjóða avtalu um at minka útlátið av veðurlagsgassum. Tíverri eydnaðist ikki heimssamfelagnum at semjast um eina avtalu. Men arbeitt verður víðari við at fáa semju í lag sum skjótast.

Neyðugt er at fara frá orðum til gerðir, tí sum starvsbróðir mín úr Maldivunum, Mohamed Nasheed, segði: “Vit kunnu ikki samráðast við náttúrulógirnar. Vit kunnu ikki handla við móður jørð.”

***

Tað er ikki bara á altjóða pallinum, at breiðar politiskar semjur eru neyðugar fyri at flyta mørk.

Málið hjá mær og landsstýrinum hevur frá fyrsta degi verið at skapa breiðar semjur millum samgongu og andstøðu um týdningarmikil samfelagsmál. Tað hevur eydnast. Løgtingið samtykti í heyst einmælt, at Føroyar skulu skerja $CO_2$ útlátið við minst 20%. Løgtingið samtykti við stórum meiriluta at seta í gildi nýggju heilsutryggingina. Og allir flokkar á tingi leggja í hesum døgum seinastu hond á nýggju pensjónsskipanina.

Megna vit at halda fast við hesi gongd við breiðum semjum, kunnu vit røkka langt. Men kravið til okkum politikarar er, at vit tora at hava felags langtíðarmál og seta okkara egnu áhugamál til víks fyri at tæna landi og fólki.

Felagsskapurin myndar tjóðina, men tað er íkastið hjá tí einstaka, sum ger munin, um so íkastið er stórt ella smátt.

Tað eru virðini, sum verða skapt á sjógvi og á landi. Tað góða arbeiðið, sum verður greitt úr hondum hjá tí privata og tí almenna. Listin, lærdómurin og nýhugsanin. Uppalingin, sum vit foreldur geva børnum okkara. Vísdómurin og royndirnar, sum tey eldru geva næsta ættarliði. Virðingin og umsorganin vit vísa øðrum.

Við øllum ágóðum fylgir ábyrgd, og við øllum rættindum fylgja skyldur. Viljin at taka tøk heldur enn trongdin at krevja ber øll samfeløg framá.

***

Lat meg siga frá einari søgu um tveir ferðamenn, sum hittu ein gamlan mann.

Ein ferðamaður nærkaðist einari bygd. Ein gamal maður sat við vegjaðaran, og tann ferðandi spurdi, hvussu fólkini í bygdini vóru. Tann gamli svaraði við at spyrja, hvussu fólkini vóru, haðani tann ferðandi kom. ”Sjálvsøkin og óálítandi,” svaraði tann ferðandi. ”Soleiðis vilja fólkini eisini vera, har tú kemur,” svaraði tann gamli.

Ferðamaðurin var ikki meir enn farin, tá ein annar ferðandi kemur og steðgar á og spyr sama spurning, hvussu fólkini í bygdini vóru. Tann gamli svaraði aftur við at spyrja, hvussu fólkini vóru, haðani hann kom. ”Tey vóru ósjálvsøkin og álítandi,” svaraði ferðamaðurin. ”Eg var keddur, tá ið eg mátti fara av bygdini.” Tann gamli svaraði: ”at soleiðis eru fólkini í bygdini, sum tú kemur til.”

Henda søga sigur, at okkara mynd av øðrum er ein spegilsmynd av okkum sjálvum. Latið okkum gera hugburðin hjá seinna ferðamanninum til okkara. Við hesum hugburði byggja vit land.

***

Enn eitt ár er um at vera runnið, og summi, vit kendu og vóru okkum kær, eru ikki longur millum okkum.

Í kvøld leita tankar okkara til teirra, sum eru farin, og okkara samkensla fer til teirra, sum eftir sita. Vit minnast í sorg tey, vit hava mist, og vit minnast í takksemi tíðina, vit fingu saman.

Vit menniskju hava frá tíðarinnar morgni livað í bólkum. Vit eru saman í gleði og í sorg, og felagsskapur okkara millum gevur tann tryggleika, sum er okkum so virðismikil.

Umsorganin fyri øðrum er dýrmætasta ábyrgd, vit kunnu átaka okkum. Næstrakærleiki er størsta gáva, vit kunnu lata. Latið okkum tí standa saman um eitt samfelag, har rúm er fyri øllum.

Guð signi okkum øll, og Guð signi Føroyar – gott nýggjár!


## Internetsamskipari til Smyril Line

WWW.
SMYRIL-
LINE
.KOM!



Vilt tú vera við at marknaðarføra Smyril Line á netinum og at samskifta online við málbólkin hjá okkum í Føroyum, Danmark, Týsklandi og aðrastaðni í Evropa, so hava vit eitt sera spennandi starv til tín.

Vit leita eftir einum starvsfólki, sum skilir týdningin av online-samskifti, og sum kann gera Smyril Line sjónligt fyri umheiminum á internetinum. Vit leita eftir einum starvsfólki, sum hevur dirvi og vilja, og sum skilir týdningin av online-marknaðarføring.

Vit bjóða tær eitt spennandi fulltíðarstarv í einari vaksandi fyritøku, sum heldur til í Tórshavn, Keypmannahavn, Hanstolm og Kiel.

Størsta ábyrgdarøkið verður at samskipa samskiftið á netinum, syrgja fyri at Smyril Line verður sjónligt, har tað er neyðugt, millum annað á Google og øðrum leitimaskinum, skriva tekstir, viðlíkahalda heimasíður og annað.

**HØVUÐSUPPGÁVUR:**

– Styrkja Smyril Line á online-økinum
– Samskipa aktivitetir í sambandi við dagføringar o.a. á heimasíðunum
– Skriva tíðindi til heimasíðurnar
– Dagføra tekstir og myndir
– Syrgja fyri, at øll produkt eru at finna
– Syrgja fyri, at alt sær gott út
– Supportera allar skrivstovur á samskiftisøkinum

**VIT VÆNTA, AT TÚ:**

– Arbeiðir skipað og sjálvstøðugt
– Hevur royndir á økinum
– Hevur viðkomandi útbúgving
– Dugir væl at samskifta við starvsfelagaðar og onnur
– Dugir at orða teg í minsta lagi á føroyskum, donskum og enskum, bæði í skrift og talu
– Hevur royndir við CMS-skipanum

*Hevur tú spurningar um starvið, ert tú altíð vælkomin at seta teg í samband við marknaðarstjóran, Henny á Líknargøtu, á +298 551511 ella á henny@smyril-line.fo.*

*Starvið skal setast skjótast til ber, so um hetta hevur tín áhuga, verður tú vinarliga biðin um sum skjótast at senda okkum tína umsókn við teldubrævi til henny@smyril-line.fo ella við vanligum brævi til:*

Smyril Line
Yviri við Strond 1
Postboks 370
FO 110 Tórshavn

SENDISTOVAN